# Fimm ættarlið



*Aftast frá vinstru:* *Olduromman (Margretha Marteinsdóttir f.Ryggstein), langomman (Ingibjørg Einarsdóttir Drangberg), omman (Yvonna Drangberg), pápin (Petur Drangberg Petersen) við lítlabeiggja í fanginum. Hann er føddur 15 sept 2009*

## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið okkara elskaða kona, mamma, vermamma, omma og langomma

**Dania Nielsen**
Tvøroyri

doyði og var jarðað.

Tøkk til starvsfólkið á Eldrasambýlinum við Sílá, prest, kirkjutænarar, sangarar, og til øll tykkum, ið hjálptu til og fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Dávur**

## Tøkk



Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæra kona, mamma, omma og vermamma okkara

**Jónhild Petersen**
fødd Dam
Sandavágur

brádliga andaðist og varð jarðað.
Takk til Sverra Steinhólm, prest, fyri góð og troystarrík orð í Kapellinum.
Takk til Oddur fyri tey vøkru orð í kirkuni, tá ið kistan kom vestur.
Takk til David Johannesen, prest, fyri góð og troystarrík orð við jarðarferðina.
Takk góði Arnold fyri tey vøkru orð til mammu í kirkjuni. Takk góði Vinjar fyri vakra tónleikin fyri ommu.
Tøkk til kirkjutænarar, urguleikara, berarar og sangarar.
Hjartans tøkk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina og ervið.
Takk til tykkum øll, sum vóru og eru um okkum í hesi sváru tíð.
Takk fyri blómur, kransar, heislanir og peningagávur til Føroyafelag móti krabbameini.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Annfinnur, Arnhold, Meinhard, Kristianna, Regin, Vinjar, Rakul og Vár**

## Dagurin

9. oktober. Dionysius, deyður umleið ár 258. Hann varð vígdur til biskup av pávanum Fabiani og fór til Fraklands sum trúboðari. Varð saman við tveimum øðrum hálshøgdur á tí staðnum, sum nú eitur Montmartre, ið merkir martýrfjallið. Best kenda halgisøgan um Dionysius er, at hann eftir at vera hálshøgdur sjálvur bar høvd sítt til tann staðin, hann vildi verða grivin. Har var kirkjan St. Denis bygd.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Føðingar



*1. oktober fingu Mirjam og Hanna ein lítlan beiggja. Hann vigaði 4200g og var 54cm langur. Foreldruni eru Unn og Petur Martin Glerfoss, Klaksvík*



*3. okt. 2009 fingu Erla Weihe Johannesen og Theodor Erling Johannesen ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3700 gr.*

22. september fingu Eyðbritt og Sørin Birgir Sørensen, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3500 gr.

25. september fingu Heidi og Bogi Næs, Hvalba, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4730 gr. Hon eitur Lóa Næs.

25 september fingu Sigrun og Arni Højgaard búsitandi í Keypmannahavn eina dóttir á Hvidovre hospital. Hon vigaði 4768 gr og var 54 cm long.

26. september fingu Else og Hanus Sjúrðaberg, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3200 gr.

27. september fingu Elsebeth og Jón Kári í Brekkuni, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

2. oktober fingu Ann Fríða Jacobsen og Helgi Øster Petersen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 2750 gr.

5. oktober fingu Rúna Olsen og Eyðun Hentze Højgaard, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3400 gr.

6. oktober fingu Anita B. Borg og Rúni Samuelsen, Saltnes, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4350 gr.

8. oktober fingu Rutt Højgaard og Petur Jacobsen, Rituvík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4000 gr.